## Inter er meistari

Um vikuskiftið hevur Inter úr Milano tryggjað sær italska meistaraheitið í fótbólti. Nærmastu kappingarneytarnir hjá inter, grannarnir úr AC Milan, taptu um vikuskiftið, og so er tað greitt, at Inter er meistari í ár. Venjari hjá Inter er umstríddi Jose Mourinho. Meistaraheitið í ár er nummar 17 í røðini hjá Inter.



## Figo gevst at spæla

Portugisiski stórspælarin Luis Figo setir nú gaggurnar á hillina. Figo spælir fyri meistaraliðið Inter í Italia, og Figo hevur gjørt av, at tá ið hetta kappingarárið endar, gevst hann at spæla fótbólt. Hann letur tó eina hurð standa upp á glopp, tí hann sigur, at um eitt gott tilboð uttanfyri Europa kemur, so vil hann umhugsa tað. Figo varð ársins spælari í Europa í 2000 og heimsins besti árið eftir.

ÍF-HB 1-3 (0-1):

# HB er komið fyri seg

*ÍF*

*HB*

**Rógvi Poulsen var serliga eyðsýndur, tá ið leikliga avrikið hjá oddaliðnum leingi var rættiliga sannførandi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Búnarnir líktust ikki tí, sum HB vanliga hevur spælt í, men leikliga var einki at finnast at hjá oddaliðnum, sum við tryggum sigri styrkti um sína støðu á stigatalvuni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tvær tær fyrstu vitjanirnar í Eysturoy var úrtøkan so soltin, sum tað henni til at vera hjá HB. Men eftir tap í landskappingini í Runavík og í steypakappingini í Gøtu, hilnaðist tað væl frægari, tá ið HB í gjár vitjaði í Fuglafirði.

At HB ikki trívist nakra aðra staðni enn í Gundadali varð væl og virðiliga avnoktað. Hóast HB longu undan hesum umfarinum var oddalið, so hava teir í sigursvanda felagnum ikki dult, at teir ikki hava verið heilt nøgdir við leikligu avrikini. Hjá HB er tað ikki nóg mikið at vinna. Tað skal helst vera við manér!

Í Fuglafirði eydnaðist tað at fáa glið á spælið, sum HB vil vera kent fyri at megna. Heimaliðið, sum so dyggiliga saknaði Bartal Eliasen, ið sat skaddur uttanfyri, vísti góðan hugburð, og ÍF kundi havt lagt seg á odda tíðliga í 1. hálvleiki, men sæð yvir allar 90 minuttirnar, so var tað so eyðsýnt, at HB hevði bæði størri breidd og tyngd.

Serliga eyðsýndur var Rógvi Poulsen. Í 4-3-3 uppstilling var hann ytstur í vinstru í álopsrøðini, og hann var ógvuliga boysin hjá Áka Petersen á høgra vongverja hjá ÍF. Ferð eftir ferð nýtti Rógvi sín skjótleika og ríka hugflogið, og tað var eftir uppspæl í vinstra borði, at fleiri av HB málunum vórðu skorað.

Tað var ikki óvæntað, at HB miðskeiðis í 1. hálvleiki setti hol á. Tá hevði bólturin í longum løtum ferðast millum HB spælararnar, sum hesa ferð vóru í lítið HB kendu ljósabláu útivallartroyggjunum, sum vórðu nýttar, tí ÍF spælir í reyðum troyggjum.

Liðformaðurin Fróði Benjaminsen skoraði fyrsta málið, eftir at Rasmus Nolsøe hevði lagt horna úr høgru innfyri og eftir eitt sindur av aftur og fram.

Fýra minuttir eftir steðgin økti sentrali miðvallarin Milan Kuljic um munin, og so kendist tað sum um, at spurningurin bara var, hvussu stórur HB sigurin fór at verða. Páll Mohr Joensen vann í vinstru bóltin av ÍF verjuni, hann setti kós ímóti Andras Gango, sum mundi vera besti ÍF maðurin, og tá ið teir báðir nærkaðust hvørjum øðrum, trillaði Páll bóltin upp á tvørs til Milan, sum trillaði bóltin í tóma málið.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki tók Rógvi Poulsen sakina í egnar hendur. Hann sneiddi seg leysan í vinstru, og so smekkaði hann umvegins fyrst handara og síðani nærra stólpan bóltin í málið.

3-0 og kanska hevði HB hug at taka frá. Andy Olsen, sum hesa ferð var fremsti ÍF spælarin, minkaði um munin, og uppskriftin hjá honum var tann sama, sum hon hevði verið hjá Rógvan Poulsen. Andy gjørdist leysur á HB hálvuni, og hann sendi umvegis handara stólpan og í málið.

ÍF royndi at koma til fleiri møguleikar, men HB ressaðist eitt sindur við aftur, eftir at leikferðin kanska var farin eitt sindur niður, og tað var ongantíð vandi á ferð hjá HB, sum sammett við fleiri av teimum, ið hava verið mett at vera argastu kappingarneytarnir, styrkti um sína støðu í toppinum.

Sigurin var trivaligur, og at spælið hevði verið, sum tey í HB vilja hava, at tað skal vera, gjørdi, at lagið var gott, tá ið ferðalagið fór úr Fuglafirði. Sjálvt um fleiri av teimum kring vøllin í undir upphitingini høvdu havt hug at fílast á, at teir ikki kendu teirra egnu, tá ið teir komu á vøllin í ljósabláum troyggjum!

## Hetta setti mót í HB

Páll M. Joensen var væl nøgdur við HB sigurin og avrikið. Hann ásannaði, at tølini høvdu ikki verið við eftir tvær tær fyrstu vitjanirnar í Eysturoy, og tí var sigurin serliga søtur:

- Vit hava roknað okkum sjálvar ikki at vera so stinnar á útivølli, men hetta avrikið var fínt. Tað gevur okkum eyka mót og dirvi, nú vit skulu fyrireika okkum til vitjanina í Sørvági. Vit vístu góðan hugburð, og eg haldi ikki, at sigurin nakrantíð var hóttur. Hóast teir minkaðu um munin til 3-1, so kendu vit tað ongantíð soleiðis, at sigurin var hóttur, tí tá ið teir høvdu skorað, so høvdu vit møguleikar at skora bæði fjórða og fimta málið var skoðsmálið hjá Pálli M. Joensen í HB.

**-mørk**

## Persónlig mistøk eru dýr

ÍF venjarin, Jón Simonsen, ásannaði, at hesa ferð hevði hansara lið spælt ímóti einum góðum fótbóltsliði:

- At teir eiga eitt gott fótbóltslið vil eitt nú siga, at spælararnir hjá teimum gera ikki persónlig mistøk. Okkara spælarar gjørdu fleiri persónlig mistøk, og tað vóru dýr. Í veruleikanum stóðust øll trý málini hjá teimum av persónligum mistøkum hjá okkara monnum. Tey kosta nógv, serliga tá ið HB er mótstøðuliðið.

Tað er tætt ímillum heimadystirnar hjá ÍF í hesum døgum. Mikukvøldið spældu fuglfirðingar fyrra hálvfinaluna í steypakappinini, í dag hødvu teir vitjan av HB, og hósdagin fer NSÍ at vitja í Fuglafirði.

Bartal Eliasen sat skaddur uttanfyri ímóti HB. Í Fuglafirði vóna teir, at hann verður førur fyri at spæla hósdagin.

**-mørk**